


*Ferðslutrygd fer at arbeiða fram móti, at koyrikortið verður hátíðarliga handað, og at mynd kemur í bløðini av teimum, sum hava fingið koyrikortið, eins og vanligt er, tá fólk hava tikið onnur prógv, heldur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

# Koyrikortið ómetalig ábyrgd

**– Koyrikortið skal ikki bara vera nakað, tú fært yvir økslina ein tilvildarligan seinnapart. Tað heldur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Hon ætlar at arbeiða fyri, at tað skal verða meira hátíðarligt enn í dag, tá tú fært koyrikort**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

– Koyrikortið er so ógvuliga virðismikið og týdningarmikið, tí et tað undrunarvert, at so lítið verður gjørt burturúr tí merkisløtu, sum tað í veruleikanum er, tá tú fært koyrikortið, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Koyrikortið er tað skjalið, sum gevur okkum loyvi at koyra bil restina av lívinum. Tá vit so vita, at ferðslan er størsta hóttanin móti fólkaheilsuni, so er sanniliga orsøk til at gera meira burturúr koyrikortinum, sigur hon.

Hon vísir á, at tá næmingar fara úr 10. flokki og prógvið verður handað er hátíðarløta í skúlanum. Næmingarnir eru oftast í Føroyskum klæðum, røður verða hildnar og tey ungu fáa blómur og gávur. Tað sama endurtekur seg, tá miðnámsútbúgvingin er av.

– Tað sama átti at verið gjørt, tá koyrikortið verður handað, og eg ivist ikki í, at tað hevði havt eina positiva psykologiska ávirkan á tey ungu og hugburðin til koyrikortið, sigur Rúna Sivertsen.

Hon sigur, at RFF fer at arbeiða fram móti, at koyrikortið verður hátíðarliga handað, og at mynd kemur í bløðini av teimum, sum hava fingið koyrikortið, eins og vanligt er, tá fólk hava tikið onnur prógv.

Fyri einum góðum ári síðani gjørdist Rúna forkvinna í RFF. Eitt av málunum, hon sum formaður hevur sett sær fyri, er at menna og broyta hugburðin hjá bilførarum. Hon heldur, at virðingin fyri ferðsluni er alt ov lítil, og tekur dømi í øðrum flutningsvegum, eitt nú loftvegis og sjóvegis.

Henda vanlukkur har, verða tær væl og virðiliga kannaðar og niðurstøða verður gjørd um, hvat hendi og hvør feilurin var. Men tá tað kemur til vanlukkur í ferðsluni, tá verður einki kannað og vit mugu bara geva okkum til gitingar.

– Vit mugu ongantíð sláa okkum til tols við, at ferðslan krevur sítt, men blíva við at gera alt vit kunnu, fyri at gera ferðsluna so trygga sum yvir-




*Heri Vang í Klaksvík - ein av komandi ungu bilførarunum - avmyndaður saman við koyrilærara sínum, Olgu Jensen, og Rúnu Sivertsen, formanni í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

# VW Touran við upp til sjey sitiplássum

**VW Touran er ein MPV, ið er bygdur yvir nýggja Golf plattformin og fæst sum fimm og sjey persónabilur. Bilurin verður gjørdur í trimum útgávum: Basis, Trendline og Highline.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

VW Touran er ein rúmligur MPV við nógvum ymiskum møguleikum til innrætting. Í standard útgávuni hevur Touran fimm sitipláss, men hann fæst eisini við sjey sitiplássum.

Við fimm sitiplássum er viðførisrúmið 600 litrar. Bilurin er arbeiðsligur og lættur at koma úr og í, og lessihæddin er lág.

Touran fæst við hesum motorum: 1,9 TDI diesel við 100 hk, og 2,0 TDI diesel við 136 hk, 1,6 bensin við 102 hk, 1,6 FSI bensin við 115 hk, og 2,0 FSI bensin við 150 hk. Allar útgávurnar uttan 1,6 við 102 hk hava 6-trins girkassa sum standard.

Prísir úr kr. 249.000.




*VW Touran er ein rúmligur MPV við nógvum ymiskum møguleikum til innrætting*

# VW Golf – heimsins mest framleiddi bilur

**VW Golf er mest framleiddi bilur í søguni, hann er farin fram um Ford T og VW Bobluna, sum annars hava sett framleiðslumet. Hvønn dag verða seldir 2100 nýggir Golfar um allan heim**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*



*VW Golf er mest framleiddi bilur í søguni, hann er farin fram um Ford T og VW Bobluna*

VW Golf er ein góð íløga. Kvaliteturin er góður, bilarnir halda leingi og hava góðan prís sum brúktir.

Nú er Golf komin í fimtu generatión, og í ár eru 30 ár liðin, síðan fyrsti Golfurin kom á marknaðin í 1974.

Nýggi Golfurin er longri, breiðari og hægri enn forgangarin, talan er sostatt um ein størri og rúmligari bil. Serliga aftan er betri beinpláss, og viðførisrúmið er vaksið við 20 litrum til 350 litrar.

Golf fæst við hesum motorum: 1,4 bensin við 175 hk, 1,6 FSI bensin við 90 hk, 1,6 bensin við 102 hk, 1,6 FSI bensin við 115 hk, 2,0 FSI bensin við 150 hk, 2,0 SDI diesel við 75 hk, 1,9 TDI diesel við 105 hk, 1,9 TDI diesel við 140 hk. Allir motorarnir lúka tey strongu Euro-4 krøvini til umhvørvisvernd.

**Prísir úr kr. 195.000**

# Rúmligur Fólkvognur sum familju- og vørubilur




**VW eru komnir á marknaðin við nýggja Caddy, sum verður gjørdur bæði sum Van og sum Kombi við upp til sjey sitiplássum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Caddy er bygdur yvir sama plattform sum VW Golf og Touran.

Vørubilurin Caddy Van er ein tann rúmligasti í sínum klassa. Vørurúmið er 3,2 rúmmetrar, og bilurin er sera arbeiðsligur við stórari hurð á síðuni og aftan við síðuhongdum hurðum ella stórari baklúku. Hann lastar 750 kg og tekur sum einki ein europlatt og nakað væl afturat.

Caddy Kombi er ein fimm persónabilur, har møgleiki er fyri tveimum setrum afturat á aftasta rað, soleiðis at hann kann hava sjey sitipláss.

Caddy fáast við hesum motorum: 1,4 bensin við 75 hk og 1,6 bensin við 102 hk, 2,0 SDI diesel við 69 hk, 1,9 TDI diesel við 104 hk.

**Prísir úr kr. 179.000**

## Nú eisini Volkswagen Marine bátamotorar



*Anton Jacobsen*

**Sum nakað nýtt er Bilasølan nú farin at selja VW bátamotorar. Motorarnir eru so gott sum teir somu sum í VW-bilunum.**

Talan er um Volkswagen Marine motorarnar í ymiskum støddum heilt frá 40 til 150 hk. Motorarnir fáast bæði við og uttan girkassa ella drevi. Eisini er møguleiki fyri einkultari ella dupultari installatión.